


# Stjørnudust á Ung i



*Grønlendski bólkurin Raven's Call við bergtakandi búnum úr skinni og pelsi. Framførslan var dansur, tónleikur og sangur, og kom íblásturin úr fornari veiðumentan og samanspælinum millum nútíð og fortíð*



*Trummukonsert á hægsta stigi úr Noregi*

**At ungfólkini, sum taka lut í Ung i Norden eru sonn listafólk gerst alt meira sjónligt. Hóskvøldið vóru aftur framførslur og salurin kókaði, meðan fólk jublaðu**

UNG I NORDEN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*myndir: Rigmor Dam*

Ung úr øllum Norðurlondum framførdu tað besta tey høvdu at bjóða á Læraraskúlanum hóskvøldið, og vóru tað londini Grønland, Finnland, Svøríki, Samaland, Áland og Noregi, sum hesaferð vístu tað, sum tey høvdu fyrireikað heimanífrá.

Áhoyrarafjøldin fagnaði teimum við lógvabrestum og til tíðir gjørdust stólarnir ov trongir og fólk reistust í gleðisrúsi at dansa, klappa og bríksla eftir ungu stjørnunum á pallinum. Sigast má, at ungu listafólkini vóru framúrskarandi sendiharrar fyri heimlond síni, og at tey heilt givið birtu upp undir og góvu íblástur til skapanarhugin hjá teimum umleið 200 ungu norðurlendingunum, sum taka lut í Ung i Norden í hesum døgum. Í øllum rokanum og teimum fantastisku framførslunum, kann tað næstan tykjast sum, at nøkur av londunum hava kýtt seg at senda umboð, sum bjóða dygd og fjølbroytni í listasniði og sýningarhátti, men mugu vit ikki gloyma endamálið við stevnuni: Í fimm dagar at samstarva og skapa saman við ungum úr grannalondunum, og harvið at læra nýggj fólk at kenna, at fáa góðar upplivingar og at knýta vinabond.

Hygg at myndarøðini her á síðuni, og fá eina smakkiroynd uppá nakað av tí, sum almenningurin sleppur at síggja og hoyra eitt nú í Miðlahúsinum fríggjakvøldið og leygarkøldið kl.20:00, og í Norðurlandahúsinum sunnudagin klokkan 17:00, tá endabresturin hjá Ung i Norden verður.

**Almenningurin kann uppliva listarligu avrikini frá Ung i Norden í Miðlahúsinum fríggjakvøldið og leygarkvøldið klokkan 20:00, og í Norðurlandahúsinum sunnudagin kl. 17:00, tá stóri endabresturin verður.**